

5 av 8 Planetum

# Eitt frískt lot av málsligum

**Sum eitt frískt lot inn á tann heldur dimma, føroyska tónleikapallin, har tað ræður um at spæla í mol og syngja um lívsins skuggasíður, kemur *Hugafar á ferð* - ein yvirlýsing í navni poppsins og jaleikans**





UMMÆLI
*Petur Háberg*
*petur@sosialurin.fo*

Tað hevur leingi verið soleiðis í Føroyum, at um tú veruligani vil vera tikin fyri fult sum sangskrivari, skulu yrkingarnar vera eitt sindur daprar og syrgiligar.

Lívið er ikki bara ‘lutter idyl’ og ein dansur á rósum. Nei, tað er hart og strævið og fult av vónbrotum.

Samstundis liva vit í einum landi, ið hevur eina harðlynta náttúru við regni, vindi og brimbardum klettum, sum er tekur undir við áðurnevndu lýsing. Tað er nakað, flest øll kunnu vera samd um, og sum nøkur av okkum yrkja um.

Men nevniligani av somu orsøk; tí at lívið er torført til tíðir, og tí at Føroyar mangan eru ein beiskur biti at svølgja, og tí at næstan allur føroysk list er døpur og tung, kemur fløgan *Hugafar á ferð* sum eitt frískt lot.

## Meistarin av Heygum

Sjáldan hevur ein fløguhúsi samfylt so væl tónleikinum sum á hesari útgávuni. Heimliga og hugnaliga kenslan, tú fær av at hyggja og nema við fløghúsan, avspeglar sera væl innihaldið á fløguni.

Allur tekstur er handskrivaður við ymsum skriftum. Myndir av upptøkutíðini eru sløddar her og har, meðan linjálir, ferðaseðlar, skógvar, gaflar og tómar tomatdósir eru bara nøkur av tingunum, ið tú møtir á veg gjøgnum húsan.

Húsin er eitt listaverk fyri seg, og Heiðrikur á Heygum hevur enn eina ferð prógvað, at hann er millum dugnaligastu grafisku listafólkunum, vit hava.

## Teitur Finnur Páll

Sum tað er við flest øllum útgávum, so er torført at lýsa hana í stuttum. Men skuldi tað verið kroyst í eina reglu, so kundi tað kanska kallast, um enn sveimandi: lívsjáttandi yrkingar, bornar av fangandi melodiium og balladar inn í heimligan sangskrivaratónleik.

Um ein blandar Teitur og Páll Finnur Páll, so hevur tú á leið ein Høgna Reistrup, pluss minus. Pena fingraspælið og bleyta røddin leiðir tankarnar á ein Mark No Limits Teitur. Samstundis fær reina poppkompositiónin við blásarum og strúkarum teg at hugsa um Páll Finnur Páll. Tó skal sigast, at Høgni er heilt sín egin, og hóast Hugafar á ferð ikki er nøkur slóðbrótandi útgávu, so er talan eina sterka